# TILTØK

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Sunnudagin kl. 11.00 Møti, kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn, kl. 18.00 Møti, major Knut Gamst talar á sunnudagsmøtinum.
Mánadagin kl. 17 og 19 Skótamøti, Hornvenjing týsdagin kl. 17.00 og 20.00.

**Hebron, Argir.**
Sunnudagin kl.10.30 Morgunmøti. Ímeðan er skipað barnaansing, kl.12 Sunnudagsskúli og samstundis kl. 12 Møti. Virgar Hvidbro talar.
Heimasíða www.hebron.fo

**Adventkirkjan**
Leygardagin kl. 10.00 Barnabíbliutími og bíbliugransking. Evni: Vónin um Jesus. Kl. 11 Gudstænasta J.V. Danielsen.

**Aglow, Tórshavn**
Fundur verður í hølunum hjá Frelsunarherinum leygarkvøldið kl. 19.30. Allar kvinnur eru vælkomnar.

**Meinigheitin í Hoyvík uppi á Brekku 3**
Mánadagin kl. 20.30 Bønarmøti.
Sunnudagin kl. 18.00 Møti v/ Harald Haraldsen, eingin sunnudagsskúli, og einki After eight fríggjakvøldið, vegna heystfrí.

**Katólska kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Messa í Kerit.
Leygardag kl. 11.30 Messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11.00 Hámessa v/ Biskup Lukas de Hovre í Mariukirkjuni. Øll eru vælkomin. Aftaná verður kirkjukaffi.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti, kl. 18.00 Evangel. møti. Øll eru vælkomin.

**Ebenezer**
Sunnudagin kl. 10.00 Breyðbróting, kl. 12.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Evangel. møti, kl. 21.00 Útimøti.
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

**Meinigheitshúsið**
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti við Klæmint Tausen, Manskórið syngur.

**Filadelfia, Landavegur 22**
E**inki ungdómsmøti í kvøld**.
Í morgin kl. 17.00 Landsbøn.
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti v/ Símun Absalonsen, kl. 11.30 Barnagudstænasta, kl. 16.00 Samkomufundur.
Mánakvøldið kl. 20.00 Bønarskúlin. Møtiskráin hjá Filadelfia sæst á heimasíðu okkara: www.filadelfia.fo

**Samkoman Immanuel**
Í kvøld kl. 20.00 Kongsins Herlið, 8 ár og eldri eru vælkomin.

**Kirkju- og missiónshúsið á Argjum**
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli og juniormøti.

**Saron, Vestmanna**
Sunnudagin kl. 18.00 Evangel. møti við Eiler Johannesen.
Mánadagin kl. 20.00 Bønarmøti hjá Árnhild og Jarvild.
Telefonandaktin 424741.

**Keldan, Skálafirði**
**Tiltakið vón fyri framman verður ikki í kvøld, lýst verður aftur seinni.**
Leygarkvøldið kl. 21.00 Opið hús v/ Arna Abrahamsen.
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti við Paula Høj, kl. 19.00 Evangel. møti við Tummas J. og Jákup Berg.
Vælkomin í Kelduna.
www.keldan.fo

**Elim, Søldarfjørður**
Sunnudagin kl. 12.00 Breyðbróting, kl. 18.00 Evangel. møti, Joen Magnus Rasmussen talar.

**Lívsins Orð**
Møti verður sunnudagin kl. 10.30. Ungdómsmøti verður mánadagin kl. 20.00.

**Thabor, Fuglafjørður**
Sunnudagsskúli verður sunnudagin kl. 14.30 í Thabor og á Kambsdali. Møti e r kl. 18. Kl. 21 er ungdómsmøti v/ Torleif Johannesen

**Sjómanskvinnuringarnir**
í Runavík, Toftum, Rituvík, Søldarfirði og Lamba samlast á Sjómansheiminum í Runavík mánakvøldið kl. 19.30. Kirstin og Andrias Andreasen siga frá og vísa myndir frá arbeiði teirra í Grønlandi. Innsavnan til sjómansmissiónina. Allar kvinnur eru vælkomnar.

**Leirvíkar Missiónshús**
Ísraelsmissiónin: Í sambandi við at Ísraelsmissiónin verður 10 ár 20. okt., verður hátíðarhald í Leirvíkar Missiónshúsi sunnudagin kl. 18.00 við talu, sangi, tónleiki, frásøgn v.m.
Øll eru vælkomin.

**Soli Deo Gloria**
Leygardagin kl. 10.00 Alphaskeið v/ Fríðtór Debes, kl. 20.30 Opið hús v/ Jónfinn Olsen.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti, Jónfinn Olsen talar.
Mánakvøldið kl. 20.00 Bønarmøti/Alpha-skeið.

**Getsemane, Klaksvík**
Mikukvøldið kl. 20.00 Bønarmøti.
Fríggjakvøldið kl. 20.00 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli og kl. 18.00 Møti.
Tú ert hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin eingin sunnudagsskúli vegna heystfrí. Kl. 17.30 bøn og lovsongsløta, kl. 18.00 Møti. Øll eru vælkomin.

**Betania, Skopun**
Einki barnaarbeiði vegna heystfrí, kl. 20.00 Mansmøti við David Bech.
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti við David Bech, kl. 18.00 Evangel. møti v/ David Bech, Jóhannes Nielsen og Teddy. Øll eru vælkomin.

**Aglow, Sandoy**
Møti verður í Samljóð mánadagin kl. 20.00, Súsanna og Ragnheidur siga frá Ísraelsferð. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Sunnudagsskúli verður sunnudagin kl. 14.00.
Vikuskiftismøtir verða leygarkvøldið kl. 19.00 við Thaborkórinum úr Fuglafirði og sunnukvøldið kl. 18.00 við Margeir Toftegård. Bønarmøti verður hálvan tíma áðrenn møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Sunnudagin kl. 15.00 Familjumøti.
Mánakvøldið kl. 20.00 Heimaforbundið.

**Betel, Vágur**
Sunnudagin kl. 11.00 Breyðbróting, kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Evangeliskur fundur
Mánadagin kl. 20,00 Bønarfundur
Ónsdagin kl. 20.00 Uppbyggingarfundur

**Missiónshúsið Libanon, Sørvágur**
Ungdómsmøti verður fríggjakvøldið kl. 20.00 Peter Tkaczyk frá Kanada talar um Heilaga Andan. Drekkamuður verður aftaná. Øll frá 7. fl. og uppeftir, eru hjartaliga vælkomin.

**Eldrafelagið Nón, Saltangará**
Vit koma saman í Hæddini týskvøldið 22. okt. kl. 19.30. Nýggir limir eru vælkomnir við.

**Møtir við Hera Elttør, trúboðara í DK**
Hósdagin 17. okt. í Suðurjyllandi í Nordborg kl. 15.00 og í Tinglev kl. 20.00.
Fríggjadagin 18. kl. 19.00 Føroyskt møti í Sønderborg missiónshúsi (Møllegade 9).
Leygardagin 19. kl. 19.30 Føroyskt møti í Carmel í Århus.
Týsdagin 22. kl. 19.30 í Nr. Nissum skole.
Mikudagin 23. kl. 19.30 í Astrup (v Skjern)
Hósdagin 24. kl. 14.30 í Arnborg (v. Herning).

**Dagtilhaldið í Vági**
er opið hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15.00-18.00. Øll kunnu vera við.

**Dagtilhaldið Fløvin**
kemur saman mánadag-fríggjadag kl. 15.00-18.00 í húsunum hjá Kongshavnar Kvinnufelag.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 212380.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórshavn tlf. 319630/61655400.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
*Mánadagin 14. okt.:*
kl. 10 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10-18 Ítriv
kl. 14-18 Kortspæl, telving, bobspæl, dart og onnur spøl Tilmelding til døgurðan mikudagin tlf. 316491
*Týsdagin 15. okt.:*
kl. 10-12 Vit baka
kl. 10-11.30 **Vit syngja.** Benny og Flemming Samuelsen. Øll eru hjartaliga vælkomin.
kl. 15 Regin sigur frá um hoyritól. Birte og Regin spæla.
*Mikudagin 16. okt.:*
kl. 10-13 Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12 Døgurði.
kl. 15 Túrur, tilm. 316491
*Hósdagin 17. okt.:*
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-17 Telduprát, Brandur Petersen
*Fríggjadagin 18. okt.:*
kl. 10-13 Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12 Døgurði. Møguleiki er at koma sum gestur. Tilm. mánadag tlf. 316491
kl. 13-17 Opið hús

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Spælistovan í Meinigheitshúsinum**
er opin frá kl. 9.00-12.00 mánadag, mikudag og hósdag fyri foreldrum við børnum uttan ansing.

**Frá felagnum Pinkubarnadeyði**
Vit hittast 2. leygardag í hvørjum mánað í Jákupsstovu í J. Patursonargøtu 24 í Havn. Nærri fæst at vita frá Annvør Nielsen tlf. 317261 ella Sólgerð Foldbo, tlf. 422184

**Heilaskaðaráðgeving**
Spyr um alt innan heilaskaða. Fyri bæði heilaskadd, avvarðandi og tey, ið arbeiða við afturvenjing.
Sendið okkum eitt meyl til neozone@neozone.dk
NeuroPlan, BellaVista, Bellevuevej 7, 2. tv., 2930 Klampenborg, Danmark.
Tú kanst eisini ringja til: tlf. +45 39902665 (Jón) mobil: +45 24430903 (Jón)
www.neozone.dk

**AA-fundir í Havn**
Reinsaríið, Tórsgøta 5:
Fundur verður í kvøld kl. 20.00-21.00 og 22.30-23.30.
Heimasíða:
http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla lærarabúðin).

**AA-fundir í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

**Al-Anon í Vágum**
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

**AA-Suðuroy**
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19.00 og sunnudag kl. 15.00.

**AA-Suðuroy/Vágur**
AA-fundur verður í Vágs skúla hvønn leygardag kl. 19.

**Blái Krossur – Glyvrar**
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

**Blái Krossur – Eiði**
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

**ACA**
(Adult children anonymous).
Fundur fyri tilkomin, ið eru uppvaksin í alkoholiskum ella dysfunktionellum familjum er hvørt leygarkvøld kl. 20.00-21.30 í Reinsaríinum, Tórsgøta 5, Tórshavn.
www.aca-danmark.dk.
E-mail:
acafaroeislands@hotmail.com
Opin roykfríur fundur fyri øll áhugaði er hvønn sunnudag kl. 16.00-17.00, í Mariukirkjuni, Varðagøta 16.

**Náttarravnarnir í Tórshavn**
Tín stuðul ger mun! Blív limur ella gang ein royndartúr. Ringið Carl 215570, Guðrið 220019, Hans Jákup 217818, Tone 261165, Ella 316261, Arni 222552

**Føroya Heimavirkisfelag**
Postboks 1209 - 110 Tórshavn.
Teldupostur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til formannin: Nigro Hermansen tlf. 314304 / fartlf. 288304.

**LFÚ-skrivstovan**
hevur opið mánadag og mikudag millum kl. 12 og 16 og týsdag kl. 16-18.
LFÚ-ráðgevingin hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 16-18.

**LISA**
skrivstovan hjá Listafólkasambandi Føroya í Dj. í Geilsgøtu 1 er opin allar gerandisdagar frá kl. 9.00-12.00.
Telefon: 310197.
Teldupostadressa: lisa@lisa.fo – heimasíða www.lisa.fo

**Amnesty International, Føroya deild**
Tinghúsvegur 18, 4. hædd
Tlf. 315816
Skrivstovan er opin mánadag frá kl. 13.00-17.00 og mikudag frá kl. 9.30-17.30.
Heimasíðan: www.amnesty.fo
Teldupost:
Amnesty-Amnesty.fo

**MÁF**
(Meginfelag Áhugaleikara Føroya)
heldur til í húsum Hans Andrias Djurhuusar undir Pisuvarða 2, Tórshavn
Tlf. 315624, Faks 315924,
e-mail: maf@maf.fo
Heimasíða: www.maf.fo
Opið er: má. og tý. kl. 10-15, mi. kl. 13-18, hó. og fr. kl. 10-15.
Endamál felagsins er at stuðla áhugaleiklist og menna hesa mentunargrein í Føroyum. 16 sjónleikarafeløg eru limir í MÁF.
Formaður: Hilmar Joensen, Nólsoy. Dagl. leiðari: Malan Matras Joensen.

**Kvinnuhúsið**
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200. Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

**Føroyskir fiskimenn uttanlands**
tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi.
Limagjald 200 kr. um árið.
Postgiro 57894. Fø.
Sparikassi 442027-8.

**Giktafelag Føroya**
Íslandsvegur 10 C
100 Tórshavn

**Lymfødemfelagið**
Box 2113, FO 165 Argir
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð. Samband fæst við felagið á tlf. 448454, Fía í Túni, ella tlf. 313424, Arnhild Johannesen.

**Parkinsonfelagið**
*MBF-húsið, Íslandsvegur 10C*
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið hjá Tórhild,
e-mail:
torhildm@post.olivant.fo
Hildebjørg, tlf. 313897,
e-mail:
jwimport@post.olivant.fo
Nakað av bókum eru til láns hjá felagnum.

**Felagið Føroyar-Kuba**
P. O. Box 2055, 165 Argir.
Tlf./fax 312098 · Teldupostur:
far_cuba@hotmail.com
Viðtala eftir avtalu.

**MBF – Meginfelag teirra brekaðu**
Skrivstovan er opin allar gerandisdagar millum kl. 09.00 og 16.00.
Íslandsvegur 10C, FO-100 Tórshavn.
Tlf. 317373. Fartlf. 264839.
Faks: 310813.
t-postur: mbf@post.olivant.fo
Heimasíða: www.mbf.fo

**Alzheimerfelagið**
Tórsbyrgi 16
100 Tórshavn
Heimasíða: www.alzheimer.fo
t-postur: sigmo@post.olivant.fo
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið á tlf. 313102.
Demenslinjan er telefonráðgeving í øllum viðvíkjandi demens. Tlf. 313102 svarar týsdag kl. 18–20.

**Sinnisbati**
Íslandsvegur 10 C,
100 Tórshavn
tlf. 322544 · Fax 310813
T-postur:
sinnbati@post.olivant.fo
Skrivstovan er opin mikudag frá kl. 16.00-18.00. Fyrsta mikudag í mánaðinum er opið til kl. 19.30.
Tú ert vælkomin at ringja og spyrja um alt, sum hevur við sinnistrupulleikar at gera á tlf. 322544.

**Heilafelagið, MBF-húsið**
Íslandsvegur 10C
tlf./fax 321520
Telefontíð hvønn týsdag kl. 18.00-20.00.



## FILMSTEIGURIN

# Dragejægerne

Ein heilt vanligan dag í 2002 gongur tann 12 ára gamli Quinn á einum byggiplássi í London og hyggur seg um. Men í mun til hinar dagarnar finnur hann av tilvild nakað heilt ótrúligt, sum hvørki hann – ella nakar annar – hevur sæð fyrr… ein livandi dreka. Tíverri kemur hann til at vakja hetta slímuta beistið við tí úrslitið, at fleiri hundrað ára gamlir eldspruttandi drekar beinanvegin byrja at køva alt menniskjalív rundan um teir.

20 ár seinni eru stórir partar av menniskjunum dripin av drekanum og hans stóra avkomi, sum stórt sæð ikki eru til at særa – heldur ikki við nýmótans og tungum vápnum. Quinn (Christian Bale) er nú vaksin og hevur – saman við Creedy – ábyrgdina av eini borg, har ein lítil bólkur av menniskjum roynir at yvirliva. Alla tíðina royna tey at hyggja upp á himmalin fyri at uppdaga flammurnar til tíðina...

Álopini hjá drekunum eru títt, neyv og effektiv. Talið av yvirlivandi minkar dag eftir degi. Sjálvt um tað framvegis eru nøkur,





sum tora út, eru tað nemliga so fá eftir, at drekarnir byrja at gerast svangir. Ætlanin hjá Quinn er so, at bíða til at drekarnir doyggja út, og so kann menniskjan nørast aftur.

Ein dag kemur ein maður, sum eitur Denton Van Zan (Matthew McConaughey). Hann sigur, at hann veit, hvussu tað ber til at útrudda drekarnar, og er komin fyri at finna frívillig at hjálpa sær við at drepa upprunaliga móðirdrekan. Men ongin trýr honum – ikki fyrr enn tey hava sæð Van Zan og hansara »einglar« í aktion, uppdaga Quinn og hansara fólk, at tað kann vera nakað um tað, hann sigur.

At byrja við tykist ein álop á drekarnar í Londum sum tað reina sjálvmorð fyri Quinn, men innan leingi verður hann noyddur til at hugsa um hetta einaferð afturat. Tað er upp á tíðina, at menniskjan berjist fyri síni framtíð og tað er tíð fyri Quinn at gera upp við demonini! Tíðin er komin til tann stóra bardagan hjá drekaveiðumonnunum…





**Frumsýning**
Fríggjadagin 18.10. kl. $23^{30}$ Leygardagin 19.10. kl. $23^{30}$
Sunnudagin 20.10. kl. $21^{45}$

**Stórt úrval av DVD-filmum til sølu**

**HAVNAR BIO**
P Tlf. 31 19 56 P
www.bio.fo




Fríggjadagin 18.10. kl. $18^{30}$
Leygardagin 19.10. kl. $18^{30}$
Sunnudagin 20.10. kl. $18^{00}$

Fríggjadagin 18.10. kl. $21^{00}$
Leygardagin 19.10. kl. $21^{00}$
Sunnudagin 20.10. kl. $19^{30}$




Fríggjadagin 18.10. kl. $19^{00}$ Leygardagin 19.10. kl. $19^{00}$
Sunnudagin 20.10. kl. $17^{30}$




Fríggjadagin 18.10. kl. $23^{15}$ Leygardagin 19.10. kl. $23^{15}$
Sunnudagin 20.10. kl. $22^{30}$




Fríggjadagin 18.10. kl. $20^{30}$ Leygardagin 19.10. kl. $20^{30}$
Sunnudagin 20.10. kl. $20^{00}$

**KOMANDI FILMUR**




**Frumsýning Fríggjadagin 25.10.**